# Datt av bingju og knústi báðar armarnar



*Sosialurin møtti honum av tilvild í Saltangará seinnapartin hósdagin. Tá ið vit fregnaðust, hví hann sá soleiðis út, fingu vit alla søguna at vita um vanlukkuna á bryggjuni í Saltangará, 7. oktober. - Eg fall við høvdinum fremst og tók armarnar fyri meg fyri at verja høvdið móti stoytinum, ið mátti koma, tá ið eg rakti bryggjuna, sigur Asbjørn Knudsen.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Eingin sá tilburðin, og eg stúrdi fyri, at maðurin í krananum fór at lyfta bingjuna, meðan eg lá har, sundurbrotin. Eg royndi at koma á føtur við egnari hjálp og sleppa mær burtur. Visti, at armarnir vóru brotnir, tí eg hoyrdi knekkið. Rullaði mær á og slapp at enda burtur úr vandaleið.**
**Soleiðis greiðir Asbjørn Knudsen frá um arbeiðsvanlukkuna, ið rakti hann eitt oktoberkvøld.**
**Fyrst í árinum keyptu hann og konan hús í Leirvík, so vanlukkan kom ógvuliga illa við hjá familjuni**

ARBEIÐSVANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*

Mánakvøldið, 7. oktober í ár, broyttist lívið hjá Asbjørn Knudsen, sum er ættaður úr Runavík, men giftur og búsitandi í Leirvík við konu og trimum børnum.

Starvið hjá honum er at koyra buss, og um kvøldarnar plagdi hann at lossa hjá Skipafelagnum í Saltangará fyri at tjena nakrar krónur aftrat, nú hann og konan høvdu keypt hús fyrst í hesum árinum.

- Vit vóru í ferð við at lossa ein av bátunum hjá Skipafelagnum. Eg var farin uppá eina bingju við stiga at krøka í, so kranin kundi taka bingjuna.

## Stigin gleið…

Tá ið Asbjørn hevði krøkt í og skuldi stíga í fyrsta trinið á stiganum, sum rakk nakað upp um kantin á bingjuni, hendi vanlukkan.

- Stigin gleið undan mær fyrst, eg steig í hann. Hevði hjálm á høvdinum, men longu í fyrsta fallinum, slerdi eg høvdið í annað hornið á bingjuni, so hjálmurin reyk av. Fallið helt fram við høvdinum fremst, so eg tók armarnar fyri meg fyri at verja høvdið móti stoytinum, ið mátti koma, tá ið eg rakti bryggjuna.

Har lá Asbjørn so, sundurbrotin. Eingin hevði sæð tilburðin. Vandi var nú fyri, at maðurin í krananum fór at lyfta bingjuna, og tá kundi rættiliga staðið um lív.

- Hetta hugsaði eg um, har eg lá. Royndi ti at koma á føtur við egnari hjálp.

Eg visti, at armarnir vóru brotnir, tí eg hoyrdi knekkið. So, teir kundi eg ikki brúka at reisa meg uppaftur við. Rullaði mær á og slapp at enda á føtur - og burtur úr vandaleið.

Aðrir menn vóru til arbeiðis á bryggjuni hetta kvøldið, men eingin var beint har, sum Asbjørn datt.

- Stýrimaðurin umborð á farmaskipinum sá tó, at alt ikki var, sum tað átti, tí ein hjálmur lá á bryggjuni.

Asbjørn bleiv koyrdur í privatbili norður til læknan í Gøtu, sum hevði vakt hetta kvøldið. Har var einki ivamál um, at maðurin noyddist suður á Landssjúkrahúsið, tí báðir armarnir vóru brotnir.

- Tíðin tóktist ógvuliga long frá tí, at vanlukkan hendi um 21-tíðina um kvøldið, til eg var komin suður á Landssjúkrahúsið um 23.30-tíðina, sigur Asbjørn.

Høgri armur var brotin í 2-3 støðum, meðan verri var statt við vinstra armi, sum var rættiliga illa farin.

- Eg noyddist undir skurð í vinstra armi, tí kúlan omanfyri handliðin og liðugurin sjálvur vóru brotin í fleiri støðum. Haldi, hetta var alt tað bera pulvur, sigur Asbjørn, sum hevur fingið at vita frá læknunum, at vinstri armur ongantíð verður hin sami aftur.

Stoyturin, hann fekk í høvdið, førdi til, at hann fekk dupulta sjón, men hetta er nú komið uppá pláss aftur.

## Kom illa við

Hjá Asbjørn og familju hansara kom vanlukkan ógvuliga illa við, tí fyrst í hesum árinum keyptu tey hús í Leirvík.

- Konan arbeiðir á virkinum hjá Kjartani Joensen, og nú eg einki fái gjørt, noyðist hon at ganga heima og passa meg - við forsorgarhjálp. Hon kann ikki sjúkrameldast, siga myndugleikarnir, tí eg eri ikki í lívsvanda. Men eg fái ikki fingið mær at eta sjálvur, og eti eg einki, vildi eg mett, at eg í longdini var í lívsvanda. Sum skilst á Asbjørn, er hann ikki nøgdur við avgerðina um, at konan ikki kann sjúkrameldast, nú tey eru so hart rakt.

Hann veit ikki, nær ella um hann nakrantíð verið so nøkulunda arbeiðsførur aftur.

- Hetta er ein stórur fíggjarligur smeitur fyri okkum, tí eg fái heldur ikki teir nógvu pengarnar, meðan eg gangi sjúkrameldaður. Eg tjenti nógv sum bussførari og við mínum eykaarbeiði sum lossari. Longu nú meti eg meg at hava mist einar 30.000 krónur av tí, sum hendi.

Í sínum arbeiði á bryggjuni, er Asbjørn tryggjaður sum aðrir arbeiðsmenn hjá

Skipafelagnum, men enn veit hann ikki, hvat spyrst burtur úr hesum.

- Øll klæðini vórðu klipt av mær, og tey fóru øll fyri skeyti. Havi spurt Tryggingarfelagið, har eg sum arbeiðsmaður eri tryggjaður, um eg fái endurgjald fyri klæðini, men felagið sigur, at tað kann eg ikki, tí eg havi ikki pakkatrygging hjá teimum. Vit hava okkara tryggingar í Trygd, og haðani er einki svar komið enn, sigur Asbjørn.

## Beina leið í bankan

- Beint eftir vanlukkuna, sum broytti øll okkara fíggjarligu viðurskifti, fór eg beina leið í bankan og bað tey steðga øllum lánsgjøldum av fíggjarkontoini, tí tann peningur, vit fáa í dag, røkkur nóg illa til tær føstu dagligu útreiðslurnar.

Asbjørn sigur, at eina ferð um vikuna ella so, noyðist hann á Landssjúkrahúsið til eftirlit, og tá noyðist konan at koyra hann, tí hann fær ikki koyrt sjálvur.

- Tá mugu børnini í pleygu, og tað kostar eisini pengar, leggur hann aftrat.

At enda sigur Asbjørn Knudsen seg fegnast um, at hann ongantíð hevur havt nakra pínu í ørmunum - ikki síðan beint eftir skurðviðgerðina.

- Eg taki ongan heilivág fyri pínu, tí tað er ikki neyðugt, sigur hann at enda.



# Incest er ein stórur trupulleiki í Føroyum

**- Tú lýgur fyri tær sjálvum, um tú sigur nakað annað. Opinleikin um evnið er størri í dag, enn hann hevur verið, men tey, sum fremja incest, eru snild sum slangur, sigur Hans Eiler Hammer, formaður í hjálparfelagsskapinum KRIS, sum nú hevur fingið skrivstovu í Saltangará**

INCEST
*Vilmund Jacobsen*

- Incest ella kynsligur ágangur móti børnum, er ein stórur trupulleiki í Føroyum.

Samfelagið er lítið, og nógv vita, hvat hendir kring um í heimunum og aðrastaðni, har slíkur ágangur fer fram. Tey, sum arbeiða við incest, vita tað. Vilja vit ikki viðganga, at hetta er ein stórur trupulleiki, lúgva vit fyri okkum sjálvum.

So avgjørdur er Hans Eiler Hammer, formaður í hjálparfelagsskapinum KRIS, sum nú hevur fingið egna skrivstovu í hølunum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará.

## Snild sum slangur

Hann heldur ikki, at trupulleikin í Føroyum er vorðin minni, hóast vit eru farin at tosa meira opið um evnið.

- Eg vil ikki siga, at ágangurin móti børnum er minkaður. Tey, sum fremja incest, eru snild sum slangan, og tað skal ikki nógv rásarúm til, fyrr enn børn kunnu verða útsett fyri hesum ágangi, sigur Hans Eiler.

Hann vísir á, at í øðrum londum verður sagt, at eini 10% av fólkinum hava verið fyri insest og heldur ikki, at talið er minni í Føroyum, hóast vit eingi ítøkilig hagtøl hava.

- Tað eru jú eisini fólk, sum nú eru vaksin, ið hava verið fyri hesum ágangi, og tí verður talið so stórt, eisini her hjá okkum.

Spurdur, hvat KRIS metir sum incest, sigur Hans Eiler, at nógvar definitiónir eru í hesum sambandi, men hjálparfelagsskapurin er av teirri áskoðan, at incest er meira enn kynslig samvera millum børn og vaksin.

- Vit definera incest sum allan kynsligan ágang, ið kann skaða børnini. Tey kunnu verða tvingaði at síggja vaksin vísa seg nakin, síggja vaksin vera saman kynsliga ella síggja pornofilmar.

Formaðurin í KRIS sigur, at felagsskapurin fer avgjørt ikki at "dempa" definitiónina uppá incest.

- Nakað annað er so tann parturin, ið rættarskipanin metir sum incest, tá ið mál koma til skarpskeringar, leggur hann aftrat.



*Ein partur av nevndini í KRIS saman við landsformanninum hjá felagsskapinum í Danmark, uttanfyri nýggju hølini í Saltangará, fv.: Kirsten Jacobsen, Tórshavn, Vibeke Møller, Danmark, Gvøðbjørg West, Klaksvík og Hans Eiler Hammer, Klaksvík. Hinir nevndarlimirnir eru, Jógvan Mortensen, Klaksvík og Fía Vang, Tórshavn. Tiltakslimir, Jóhanna Vest, Klaksvík og Ásla Sevdal, Fuglafjørður.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Fegin um hølini

Hans Eiler Hammer sigur, at tey eru sera fegin um hølini, felagsskapurin nú leigar frá Hæddini.

Spurdur, hví KRIS júst hevur valt Saltangará, sigur hann:

- Vit hava alla tíðina ætlað okkum inn á meginøkið við skrivstovuni. At fáa hølir til leigu í Havn, er bæði torført og kostnaðarmikið. Vit halda, at Runavíkarøkið liggur væl fyri, tí komandi er úr stórum parti av landinum, og her er nógv ferðsla og nógv virksemi í økinum.

Hans Eiler sigur, at hølini, sum eru í syðra enda á bygninginum, eru ikki stór, einar 15-20 fermetrar, men tey eru væl egnaði til endamálið við egnari inngongd og wc.

- Vit skulu bara hava okkara skrivstovuútgerð inn umframt eina sofu, so fólk kunnu støkka inn á gólvið til prát. Vit fara bæði at ráðgeva offrum og avvarðandi, eins og vit fara at røkja tey sambond haðani, sum vit hava við stovnar, skúlar, barnaverndir og onnur.

Telefonnummarið hjá KRIS í Saltangará er 448181.

## Tvey ár á baki

Hjálparfelagsskapurin KRIS hevur stívliga tvey ár á baki.

Felagið, sum er stovnað, 15. september 2000, hevur eina 5-mannanevnd við tveimum eykalimum. Hesi umboða flestu partar av landinum. Formaðurin verður valdur fyri tvey ár í senn, og til várs verður aftur aðalfundur.

Upplýsingar- og fyribyrgingarvirksemi er tó eldri enn tvey ár.

- Tað eru trý ár, síðan vit settu ljóskastaran á hesi viðurskifti, ið eru børnunum og teimum, ið hava verið fyri incest, til bága.

KRIS hevur skipað fyri fleiri skeiðum og veitt ráðgeving kring landið, har stovnar, skúlar, barnaverndir, samkomur, incestoffur og avvarðandi hava verið við. Felagsskapurin hevur eisini vitjað úti á skúlum.

Nú í vikuskiftinum heldur KRIS skeið á Tvøroyri.

- Vit uppreklamera ikki okkara arbeiði, men arbeiða í tí stilla. Tað halda vit, tænir sakini best, sigur Hans Eiler Hammer, formaður í hjálparfelagsskapinum KRIS.

# KRIS hjálpir fólki, sum hava verið fyri kynsligum ágangi

**Í næstum gevur KRIS út ein myndakalendara, sum verður seldur um alt landið**

HJÁLPARARBEIÐI
*Vilmund Jacobsen*

KRIS í Føroyum er ein kristiligur hjálparfelagsskapur. Navnið er ein stytting fyri "Kristilig Ráðgeving fyri Incestoffur og Seksuelt misnýtt". Felagsskapurin er stovnaður við tí máli, at gleðiboðskapurin um vón og bjarging eisini er galdandi fyri tað kynsmisnýtta menniskjað, sum sagt verður í faldara. Neyvaru endamálini hjá KRIS eru -

* at upplýsa um støddina á trupulleikanum og vísa á teir møguleikar, ein misnýttur hevur fyri at fáa vegleiðing og hjálp.
* at upplýsa um kynsligan ágang, bæði innan og uttan kirkju- og samkomugátt.
* at boða særdum menniskjum gleðiboðskapin.
* at útbúgva og menna vegleiðarar, bæði innan og uttan kirkju-og samkomugátt.
* at fyribyrgja kynsligum ágangi í kirkju/ samkomum og í samfelagnum sum heild.
* at vegleiða og hjálpa teimum, ið hava verið fyri slíkum ágangi, næstringum og børnum teirra. At gera tey før fyri at liva eitt lív við vón og framtíð.

## Professionelt

Umframt at hava skrivstovu, sum fyribils verður opin seinnapart mánadag og hósdag, skipar KRIS fyri skeiðvirksemi kring landið og vitjar á skúlum og stovnum.

Ein partur av fíggingini av virkseminum, er hesi skeiðir, sum gjaldast skal fyri. Í ár fær felagsskapurin eisini 150.000 kr. á løgtingsfíggjarlógini, og formaðurin, Hans Eiler Hammer, ásannar, at hesin peningur hevur verið viðvirkandi til, at KRIS kundi lata skrivstovuna í Saltangará upp so skjótt.

Fyritøkur í Klaksvík og í Runavíkarøkinum hava verið beinasamar og hava latið skrivstovuútgerð og innbúgv fyri sámuligar prísir og við lagaligum gjaldsavtalum.

- Ætlanin hjá okkum er í fyrstu syfti at hava lønt fólk á skrivstovuni nakrar tímar um vikuna. Síðan er ætlanin at veksa um tímarnar, soleiðis at fólk í øðrum lagi er á skrivstovuni hálva tíð og at enda fulla tíð.

Hans Eiler Hammer sigur, at KRIS hevur ríkiligt av arbeiði til eitt fólk fulla tíð - við eitt nú at leggja til rættis skeiðvirksemi, savna og skipa upplýsandi tilfar og taka ímóti fólki, sum vitja inn á gólvið ella seta seg í samband við felagsskapin í aðrar mátar.

## Myndakalendari

Um nakrar dagar gevur KRIS út ein myndakalendara fyri ár 2003. Á kalendaranum verður upplýsandi tilfar á øllum síðum. Myndirnar hevur Vasti, sum er ein grafisk stova í Klaksvík, syrgt fyri, og tey hava eisini sett kalendaran upp.

- Alt arbeiði er góðkent, og kaldarin verður prentaður í komandi viku, sigur Hans Eiler Hammer.

Ætlanin er at selja kalendaran frá hurð til hurð, eins og hann eisini verður at fáa til keyps í sølubúðum kring landið.

Formaðurin í KRIS vónar, at sølan eisini fer at geva felagsskapinum eitt fíggjarligt íkast.

- Vit vóna at fáa eitt yvirskot uppá góðar 100.000 krónur, sigur Hans Eiler Hammer.



*Hans Eiler Hammer, formaður í KRIS, í snotuligu hølunum í Saltangará.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

KRIS hevur søkt um og er sloppið undan at gjalda mvg av søluni.